## NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Vaktarskifti í Sparikassanum

**Sæunn L. Petersen hevur tikið við starvi sum varaleiðari fyri deildir Sparikassans í Suðurstreymi, eftir at fyrrverandi varaleiðarin, Eyðun Mørkøre, er vorðin leiðari á nýggju deild Sparikassans í Klaksvík**

TÍÐINDASKRIV



*Sæunn L. Petersen*



*Eyðun Mørkøre*

Ein kvinna er komin í starvið sum varaleiðari fyri deildirnar hjá Føroya Sparikassa í Suðurstreymi.

Talan er um hina 34 ára gomlu Sæunn L. Petersen. Hon hevur higartil verið leiðari á sparikassadeildini í Hornabø í Havn, har hon gjørdist leiðari í august 2002, men frá 1. januar 2006 at rokna, hevur hon røkt nýggja starv sítt sum varaleiðari fyri deildirnar í Suðurstreymi.

Sæunn L. Petersen er ættað úr Rituvík, og umframt royndir og peningastovnsútbúgving hevur hon eisini tikið HD í uttanríkishandli.

Hon tekur við nýggja starvi sínum eftir 34 ára gamla Eyðun Mørkøre, ið er farin í starv sum leiðari á nýggju deild Sparikassans í Klaksvík.

Eyðun, sum er ættaður úr Klaksvík, hevur verið útlánsleiðari á deildunum í Suðurstreymi síðani 1999 og eisini varaleiðari síðani desember 2002. Hann hevur royndir úr yrkinum og útbúgving frá Finans Akademiinum hjá danska fíggjarsektorinum.

Deildin hjá Føroya Sparikassa í Klaksvík letur væntandi upp í fyrru helvt av februar, og fyribils skulu fýra fólk arbeiða á nýggju deildini.

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Jonu Mikkelsen** fer úr kapellinum á Klaksvíkar Sjúkrahúsið, fríggjadagin 13. januar kl. 18. Jarðarferðin verður úr Kristianskirkjuni leygardagin 14. januar kl. 13.

Kistan við **Ketty Joensen** fer úr kapellinum á Klaksvíkar Sjúkrahúsið í fríggjadagin 13. januar kl. 16. Jarðarferðin verður úr leygardagin 14. januar kl. 12. Tey, ið vilja minnast Ketty, kunnu lata eina peningagávu til konta í Norðoyar Sparikassa.

**Leif Joensen** úr Vági, vanliga nevndur Leif hjá Lanne, andaðist Týsdagin 10. januar á Suðuroyar sjúkrahúsið 69 ára gamal. Kistan fer úr kapellinum á Suðuroyar Sjúkrahúsið fríggjakvøldið kl. 18. Jarðarferðin verður leygardagin kl. 13.00 úr Vágs kirkju.

Kistan við **Marjettu Heinesen**, Klaksvík, fer úr kapellinum hósdagin 12. januar kl. 18. Jarðarferðin verður úr Kristianskirkjuni fríggjadagin 13. januar kl. 13. Tey, sum vilja minnast Marjettu, kunnu lata eina gávu til Sjómannskvinnuringin; konta í Norðoyar Sparikassa.

**Martin Christiansen**, ættaður úr Fuglafirði búsitani á Frederiksberg, andaðist mánadagin 9. januar, 74 ára gamal. Jarðarferðin verður leygardagin 14.januar kl. 12.30, úr Bavenehøj kirke.

# Føni og slætti hár

**Tóra Hansen var ein út av fleiri næmingum í 10. flokki í Sørvágs skúla sum valdu at fara í starvsvenjing í Havn. 12 næmingar vóru í starvsvenjing í Havn, harav 10 vóru gentur. Vit vóru hjá Salong Tótu, har Tóra var í starvsvenjing, fyri at spyrja hana nakrar spurningar**

STARVSVENJING
*Poul Hallur Davidsen*

*Hví valdi tú júst hetta starvið?*
Tí at eg skal kanska verða frisør, tá ið eg verið vaksin

*Hvat dámar tær at vera her?*
Mær dámar ordiliga væl

*Hvat hevur tú gjørt higartil?*
Sópað gólv, gjørt kaffi, fønað og slættað hár og tikið telefonina

*Hvat gert tú beint nú?*
Gerið klárt til ein arbeiðsdag

*Kundi tú hugsað tær at arbeitt við hesum í framtíðini?*
Ja

*Gleðir tú teg at fara aftur í skúla?*
Ja, eg gleði meg eitt sindur

*Hvussu er at vera í Havn?*
Super, tí at eg eri einsamøll, her er eingin mamma. Og tí at man kann gera alt møguligt her, sum t.d at bowla, fara í biograf og ymiskt annað.



*Tóra Hansen í Sørvági, sum gongur í 10. flokki, er í starvsvenjing hjá Salong Tótu í Havn*

Sagt verður frá, at kæra kona mín, mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Jona Michelsen**
Klaksvík, ættað úr Vági

andaðist á Norðoya Røktarheimi sunnudagin 8. januar 90 ára gomul.

Kistan fer úr kapellinum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi fríggjakvøldið 13. januar kl. 18.00.
Jarðarferðin verður úr Christianskirkjuni leygardagin 14. januar kl. 13.00.

*Vegna familjuna*
**Ólavur og børnini**

# Tøkk

Hjartaliga takki eg øllum tykkum mongu, sum gleddu meg á 85 ára føðingardegi mínum tann 5. november 2005.

Takk til øll tykkum, sum møttu upp í føðingardag í Pálsstovu. Takk fyri gávur, blómur, heilsanir, talur og sangir. Takk til børn og ommubørn, verdóttur og versynir fyri at gera dagin so ógloymandi.

Eisini ein stór tøkk til tykkum, sum gjørdu mat og borðreiddu.

Tykkum øllum ynskist eitt av Harranum signað nýggjár.

**Anna á Váli**
**Skørugøta 9, Tórshavn**

## MÓTTØKA



Herluf L. Simonsen

Í samband við at Herluf L. Simonsen, lærari fer frá aftaná 37 ár sum lærari á Tekniska Skúlanum í Tórshavn, verður

***Almenn MÓTTØKA***

***Fríggjadagin 13. januar 2006, frá kl. 15.00***

Í kantinuni á Skúlaheiminum við Marknagilsvegin.

TEKNISKI SKÚLIN
TÓRSHAVN

# Tøkk

Tøkk fyri sýnda samkenslu, tá okkara góði beiggi

**Hilmar Heinesen**
Tórshavn

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk til Sonju Klein prest fyri troystarrík orð.
Tøkk til sangarar, kirkjutænarar, gravarar, berarar og tykkum, sum á ymiskan hátt hjálptu til við jarðarferðina og ervið, tøkk fyri blómur, kransar og heilsanir.
Hjartans tøkk til tykkum øll, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Emmy, Heini og Birgit**